Torført at hóma nøkur tekin til økt sjálvstýri

– Javnaðarflokkurin ásannar, at tað verður neyðugt at hækka játtanina við minst 5 mió. kr., um vit skulu nøkta tann tørv á barnaansing, sum er úti í kommununum í løtuni og sum tykist at vera støðugt vaksandi. – Tá hædd ikki er tikin fyri nýggjari lóggávu um lestrarstuðul á fíggjarlógaruppskotinum, kunnu vit staðfesta, at landsstýrið ongar ætlanir hevur um at bøta um korini hjá lesandi. Javnaðarflokkurin fer tí at leggja slíkt uppskot fram á ting, sigur minnilutin í fíggjarnevndini, Vilhelm Johannesen, í sínum viðmerkingum til fíggjarlógina

Ólavur í Beiti

Vilhelm Johannesen, sigur í viðmerkingunum í minnilutaálitinum, at tá uppskotið til fíggjarløgtingslóg fyri 1999 var til 1. viðgerð á tingi tann 7. og 8. oktober, varð boðað frá í framsøgurøðu javnaðarfloksins, at flokkurin fór til arbeiðis í fíggjarnevndini við útrættari hond. Um útlitini fyri, at floksins umboð í fíggjarnevndini fór at verða við í meirilutaálitinum frá samgonguumboðunum, tá fíggjarnevndin fór at enda arbeiði sítt, varð sagt, at hetta sjálvandi var treytað av, um umboðini fyri samgonguflokkarnar vildu taka ímóti hondini frá javnaðarflokkinum.

– Í somu framsøgurøðu varð sagt, at javnaðarflokkurin setti sum treyt fyri at taka undir við samgonguumboðunum í fíggjarnevndini, at játtanin til fólkapensión og aðrar almannaveitingar, eitt nú játtanin til dagstovnar, verður hækkað, at lestrarstuðulin verður hækkaður, at eldrarøktin fær eina nøktandi játtan og at játtanin til bústovnar fyri brekað aftur kemur á fíggjarlógina.

Villa í árstølum

Og víðari sigur Vilhelm Johannesen, at undir viðgerðini í fíggjarnevndini hevur umboð javnaðarfloksins fingið vissu fyri, at orsøkin til, at játtanin til bústovnar fyri brekað ikki var við á framlagda uppskotinum, var ein villa í árstølunum. Hetta er nú rættað og játtanin í 1999 verður 4 mió. kr.

– Somuleiðis hevur umboð floksins fingið vissu fyri, at uppskotna játtanin til eldrarøktina í 1999, fer at røkka. Men javnaðarflokkurin mælir til, at kannað verður, um heimarøktin veitur eina fyri brúkaran rímiliga tænastu. Um neyðugt fer flokkurin at reisa tann spurningin í løgtinginum.

Í meirilutaálitinum verður mælt til, at játtanin til fólkapensión verður hækkað við kr. 15.379.000 og er hetta tað, sum neyðugt er, fyri at fremja lógina um javning av fólkapensiónini.

– Men hetta heldur javnaðarflokkurin ikki vera nóg mikið. Vit vilja umframt javningina í almannaveitingunum hava eina rímiliga hækking í pensiónsviðbótini bæði til stakar fólkapensionistar og til hjún soleiðis, at hesi veruliga koma at merkja ein bata í livikorunum. Og vit halda, at hetta eigur at verða gjørt nú.

Og víðari sigur javnaðartingmaðurin, at allir tingmenn eru samdir um, at fólkapensiónin tey seinastu mongu árini, er afturúrsigld. Einasti batin hesi árini er gjaldið úr arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum, sum byrjaði at gjalda út 1. apríl 1997. Tann partvísa javningin av almannaveitingum, herundir í fólkapensiónini, sum er til viðgerðar í tinginum í løtuni, er bert eitt lítið endurgjald fyri reallønartapið, ið fólkapensiónirnir hava havt seinastu árini, síðan javningin av pensiónunum helt uppat í 1993.

Viðbrekin búskapur

– Hóast føroyski búskapurin hevur tað gott í løtuni, so eiga vit at sýna størsta varsemi, tá okkara búskapur er sera viðbrekin. Men umstøðurnar tala sum nevnt fyri, at vit fult út hava ráð at endurgjalda inntøkumissin seinastu árini og tí skjóta vit upp, at bøtt verður fyrst og fremst um fíggjarligu korini hjá teimum pensionistum, ið bert hava almennu fólkapensiónina, ella sum ikki hava stórvegis av aðrari inntøku.

Og minnilutin í fíggjarnevndini, Vilhelm Johannesen, heldur tað ikki vera sømuligt, at samgongan og landsstýrið nýta ein pensiónsreform, sum tað tekur eitt heilt arbeiðslív at spara upp til, sum undanførðslu fyri ikki at hækka pensiónirnar nú beinanvegin.

– Flokkurin mælir tí til, at pensiónsviðbótina hjá støkum pensionistum hækkar við kr. 1300,00 um mánaðin, og at viðbótin hjá hjúnum hækkar við tilsamans kr. 1.700,00. Skotið verður upp, at hækkingarnar fáa gildi frá 1. februar 1999.

Dagstovnar

Og viðvíkjandi dagstovnum, heldur Vilhelm Johannesen, at tað verður neyðugt at hækka játtanina við minst 5 mió. kr., um vit skulu nøkta tann tørv á barnaansing, sum er úti í kommununum í løtuni og sum tykist at vera støðugt vaksandi.

– Seinastu árini hevur trupulleikin verið tann, at foreldur ikki fáa børn síni ansað innan tryggar karmar við mennandi pædagogiskum innihaldi, meðan tey eru til arbeiðis, ella royna at fara til arbeiðis, vorðin alt størri og størri. Hesin trupulleikin tykist ikki at hava tað neyðugu raðfestingina hjá verandi samgongu. Við tørvandi raðfesting og vilja noktar samgongan fleiri hundrað foreldrum atgongd til føroyska arbeiðsmarknaðin.

– Síggja vit burtur frá fløgunum, kunnu vit rokna við, at raksturin av barnaansingarstovnum nærum er útreiðsluneutralur hjá landinum og kommunum. Sum er rinda foreldrini 30% og landskassin og kommununar 35% hvør av rakstrinum. Umleið 90% av rakstrarútreiðslunum fara til at løna starvsfólki. Hesi rinda skatt av lønini, umframt at tann peningur, ið tey hava eftir, fer í umfar í samfelagnum og vil harvið føra aðrar óbeinleiðis skattainntøkur við sær.

Uppihaldspeningur

Ein onnur játtan undir, sum javnaðarflokkurin mælir til at broyta, er stuðul til uppihaldspening.

– Tá reglurnar um ymiskar frádráttir á sjálvuppgávuni fyri bert tveimum árum síðani vórðu settar úr gildi, varð lógfest, at landskassin í staðin skuldi veita ein kontantan stuðul til rentuútreiðslur, ferðaútreiðslur, dupult húsarhald, uppihaldspening o. s. fr. Ætlan landsstýrisins um at strika játtanina til stuðul til uppihaldspening fer at geva teimum við uppihaldsskyldu verri møguleikar at hava umsorgan fyri sínum børnum, tá landsstýrið í veruleikanum hervið áleggur teimum ein eykaskatt.

Og minnilutin, Vilhelm Johannesen, átalar, at samgongan uttan at kanna sosialu avleiðingarnar setir hesa stuðulsskipan úr gildi. Broytingin í lógini letur eisini upp fyri spekulatión, tá tann gjaldsskyldugi t.d. kann flyta til Danmarkar, har hann kann draga gjaldið frá skattskyldugu inntøkuni, meðan uppihaldspeningurin verður gjørdur skattafríur hjá móttakaranum. Tað tykist minnilutanum órímiligt, at hendan eina stuðulsskipanin skal setast úr gildi, meðan hinar, ið komu samstundis, halda fram.

Lestrarstuðul

Í fíggjarlógaruppskotinum verður lestrarstuðulin í 1999 skerdur í mun til játtanina í verandi fíggjarári. Í 1998 er játtanin kr. 44.118.000. Í uppskotinum fyri 1999 er játtanin til lestrarstuðul sett til kr. 42.004.000.

– Fyri støðugt at bøta um korini hjá okkara lesandi ungdómi heldur javnaðarflokkurin, at lóggávan um lestrarstuðul, ið varð framløgd á ting í vár við ávísum broytingum, eigur at verða sett í verk.

– Tá hædd ikki er tikin fyri nýggjari lóggávu um lestrarstuðul á fíggjarlógaruppskotinum, kunnu vit staðfesta, at landsstýrið ongar ætlanir hevur um at bøta um korini hjá lesandi. Javnaðarflokkurin fer tí at leggja slíkt uppskot fram á ting. Nýggj lóggáva fer tí ikki at virka, fyrr enn komandi skúlaár byrjar. Eftir minnilutans hugsan skal ein nýggj lóggáva geva umleið 15 mió. kr. meira í lestrarstuðuli um árið. Tí verður mælt til at hækka játtanina fyri 1999 við 7 mió. kr. Tað vil siga, at uppskotna játtanin hjá landsstýrinum verður hækkað úr 42 upp í 49 milliónir krónir.

101,6 mió. í avlopi

Og viðvíkjandi teimum 6 mió. kr. til sjálvstýrismál, sigur Vilhelm Johannesen, at vísandi til støðu javnaðarfloksins í spurninginum um ríkisrættarligu støðu Føroya, kann minnilutin heldur ikki taka undir við, at 6 mió. kr. verða játtaðar til sjálvsstýrisfyrisiting,

– Samanlagt føra broytingaruppskotini hjá minnilutanum við sær, at útreiðslusíðan verður hækkað við 69 milliónum krónum og lækkað við 46 milliónum krónum, og tað vil siga, at avlopið á fíggjarlógini sambært uppskotum minnilutans verður 101,6 milliónir krónir.

– At enda vil minnilutin vísa á, at í framlagda fíggjarlógaruppskotinum hjá landsstýrinum var torført at hóma nøkur tekin til økt sjálvsstýri og enn minni nøkur tekin til føroyskt fullveldi. Aftan á at meirilutin í fíggjarnevndini hevur sett síni fingramerkir á fíggjarlógina fyri 1999, kunnu vit staðfesta, at hesi tekin eru vorðin enn kámari, sigur Vilhelm Johannesen í viðmerkingum sínum í álitinum til broytingar í fíggjarlógini.

Umbønir um eykajáttan í komandi ári

– Eftir mikið politiskt stríð eydnaðist farnu samgongu undir sambandsleiðslu at fáa føroyska búskapin á føtur aftur við javnvág og avlopi á landsins fíggjarlóg, sigur minnilutin í fíggjarnevndini, Flemming Mikkelsen og Lisbeth L. Petersen, í áliti sínum

Ólavur í Beiti

Í byrjanini til viðmerkingarnar í minnilutaálitinum frá Flemming Mikkelsen og Lisbeth L. Petersen, verður sagt, at eftir mikið politiskt stríð eydnaðist farnu samgongu undir sambandsleiðslu at fáa føroyska búskapin á føtur aftur við javnvág og avlopi á landsins fíggjarlóg.

– Nú við árslok kann fullveldissamgongan við Fólkaflokkinum á odda reypa sær av einum 3 sifraðum millióna avlopi á komandi fíggjarlóg, verður sagt í hesum minnilutaálitinum.

Hækkingar

Og minnilutin sigur víðari, at hann í ávísan mun tekur undir við uppskoti landsstýrisins við seinni broytingum, av tí at tað fyri størsta partin byggir á tær raðfestingar og ta kós fyri samfelagsmenningina, sum undanfarna landsstýrið stakk út í kortið.

– Minnilutin ger tó vart við, at nýggja landsstýrið nærum ikki hevur tikið hædd fyri teim útreiðsluhækkingum, sum standast av nýggjari lóggávu, sum boðað er frá, at landsstýrið ætlar at fremja. Sostatt kann roknast við einum streymi um umbønum um eykajáttan í komandi ári.

Pensionistar

Og Flemming Mikkelsen og Lisbeth L. Petersen gera vart við, at nú er tíðin komin til at hjálpa serliga einum bólki, sum merkti sviðan av kreppuni, sum var.

– Tí mælir minnilutin vegna Sambandsflokkin til at hækka viðbøturnar hjá fólkapensionistunum munandi. Teir pensionistar, sum eru ringast fyri, eiga at fáa munandi ábót nú. Tað kann ikki vera rætt at gera stórar hækkingar í tingmannalønunum, mæla til skattalækkingar og hópin av yvirtøkum, ið allar kosta nógvan pening, samstundis sum bondini og rættindini, sum vit enn hava sum partur av størri samfelag verða kvett, og meðan føroyski fólkapensionisturin ikki fær endarnar at røkka saman fíggjarliga. Her verður mælt til eina hækking upp á 51.500 tús.kr. (oman á javningina), sigur minniluti Sambandsfloksins í fíggjarnevndini.

Barnaansing, mentan o.a.

Viðvíkjandi barnaansingarøkinum, sigur minnilutin, at tað er stórur tørvur á ansingarplássum, og hesin tørvur veksur, tess meira virksemi er í samfelagnum. Føroyska samfelagið er broytt, so tað nyttar ikki at berjast ímóti.

greinin endar á síðu 6

Úrslitið á fíggjarlógini betrað við 1 mia. kr. síðan 88

Yvirskotið á fíggjarløgtinglógini fyri 1998 var mett til 46 mió. kr. Eftir nýggjastu metingum, sum fíggjarnevndin hevur fingið frá fíggjarmálastýrinum, verður úrslit landsskassans í 1998 332 mió. kr. hægri, enn upprunaliga mett, soleiðis at yvirskot landsskassans í 1998 verður mett til at verða 378 mió. kr.

Fíggjarnevndin hevur nú latið álit sítt viðvíkjandi fíggjarlógini, og í innganginum til hetta drúgva álit, heili 15.500 orð, verður m.a. nevnt, at nevndin undir viðgerðini hevur havt fund við Finnboga Ísakson, løgtingsformann og Anfinn Kallsberg, løgmann, og landsstýrismenninar Høgna Hoydal, Karsten Hansen, Finnboga Arge, Helenu Dam á Neystabø, Signar á Brúnni og Eyðun Elttør.

– Saman við løgtingsformanninum var skrivstovustjóri løgtingsins á fundi, og saman við løgmanni og landsstýrismonnunum vóru løgmansstjórin, aðalstýrisstjórar og fulltrúar í landsstýrisumsitingini á fundi við nevndina.

Nevndin hevur eisini havt fund við Landsbanka Føroya Búskaparráðið Føroya Banka Føroya Sparikassa og Fiskasøluna

Mett til 46 mió

Og fíggjarnevndin hevur eisini undir viðgerðini biðið um og fingið upplýsingar, sum hava verið neyðugar í sambandi við viðgerðina av fíggjarløgtingslógini 1999. Eisini hevur nevndin fingið skriv frá einstaklingum, stovnum og felagsskapum, og eru hesi skriv umrødd undir viðgerðini.

– Fíggjarnevndin hevur gjøgnumgingið allar greinar og konti á fíggjarlógini, verður sagt í innganginum.

Og víðari sigur nevndin, at yvirskotið á fíggjarløgtinglógini fyri 1998 var mett til 46 mió. kr. Eftir nýggjastu metingum, sum fíggjarnevndin hevur fingið frá fíggjarmálastýrinum, verður úrslit landskassans í 1998 332 mió. kr. hægri, enn upprunaliga mett, soleiðis at yvirskot landskassans í 1998 verður mett til at verða 378 mió. kr. Upplýst er fyri fíggjarnevndini, at síðani 1988 er úrslitið á fíggjarlógini betrað við 1 mia. kr, tá rentur og avdráttir ikki eru tiknar við.

Vøkstur í fiskivinnuni og

Fíggjarnevndin hevur fingið upplýst, at vøksturin í lønarútgjalding hevur verið 11% í tíðarskeiðnum frá oktober 1997 til september 1998, samanborið við sama tíðarskeið 1996/1997, og at hesin vøkstur er tiltakandi. Vøksturin av fiskiskapi er 22%, í byggivinnuni 28%, í handli og umvæling 10%, og fiskivinnuídnaðurin á landi hevur ein vøkstur upp á 13%. Privatu vinnurnar eru øktar 13% , meðan almennu tænasturnar økjast 6%.

– Av privatu vinnunum hevur fiskivinnan ein vøkstur uppá 174 mió. kr. Upplýst er fyri nevndini, at nøgdin av útflutningi av óviðgjørdum fiski er minkaður í nøgd, meðan stórur vøkstur er í útflutninginum av frystum flaki, verður upplýst í generellu viðmerkingunum frá fíggjarnevndini.

Laksur og góðskaðar vørur

Frá útflutningsvinnuni hevur nevndin fingið upplýst, at fiskaprísinir í 1998 hava verið sera góðir, og útlit eru fyri, at prísirnir stabilisera seg á sama høga støði í 1999 uttan so, at okkurt óvæntað hendur, t.d. um fíggjarkreppan í Asia fer at ávirka europeiska búskapin. Umleið 80% av fiskaútflutninginum fer til Europa.

– Upplýst er, at eftirspurningurin eftir toski fer væntandi at vaksa í 1999, tí toskakvoturnar verða lægri í 1999 enn í 1998. Eisini kann væntast, at eftirspurningurin eftir upsa verður størri, tí fiskiskapurin eftir pollac og hake eisini minkar í 1999.

– Um tøkuna av laksi hevur nevndin fingið upplýst, at væntandi verða tikin 28.000 tons í 1999, og um søluprísirnir verða á sama støði sum nú, kemur útflutningsvirðið upp í móti 650 mió. kr. Útflutningsvirði verður umleið kr. Prísurin á laksi liggur um 20 - 22 kr/kg. Framleiðslan av góðskaðum vørum úr alifiski, er vaksandi, eitt nú framleiðslu av portiónum. Útflutningurin av góðskaðum alivørum verður í 1999 væntandi 3.800 tons.

Rentan, sethús o.a.

Og viðvíkjandi rentuni, verður sagt í innganginum, at fíggjarnevndin hevur fingið ábending um, at rentan verður á núverandi støði eisini í komandi ári. Nevndin hevur fingið upplýst, at fleiri kommunur samráðast ella hava gjørt nýggjar avtalur við peningastovnarnar um broyttan afturgjaldshátt av skuldini og eru komnar undir sokallaðu 10% loysnina, har peningastovnarnir bjóða eina rentu, sum í løtuni er 5,5%.

– Um sethúsabygging er upplýst fyri nevndini, at í 1998 verða bygd umleið 60 nýggj sethús. Í 1997 vórðu 51 nýggj sethús bygd og í 1996 var talið 25. Tá sethúsabyggingin var upp á tað hægsta í áttatiárunum, vórðu bygd millum 3 og 400 nýggj sethús árliga. Í mun til fólkavøksturin verður hildið, at eitt árligt miðaltal av nýbygdum sethúsum kann at verða væl hægri enn bygt er í 1998, verður m.a. sagt í generellu viðmerkingunum hjá fíggjarnevndini, men tað er ikki ein samd nevnd sum tekur undir við fíggjarlógini. Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.